# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Í tílíkari løtu eigur indiska stjórnin at steðga eitt sindur á og at draga andan djúpt*
*pakistanski forsetin*

# Upp á land at jagstra sjórænarar



*Eitt skip hjá jemensku sjóverjuni heldur eyga við skipum í Adenvíkini*
*Mynd: Polfoto*

**USA hevur nú biðið ST um heimild til at jagstra teir somalisku sjórænararnar - bæði á sjógvi og landi**

Amerikanskir diplomatar royna í hesum døgum at sannføra ST-trygdarráðið um, at tað eigur at gera eina samtykt, sum skal gera tað møguligt at jagstra sjórænarar uppi á landi.

Ætlanin hjá amerikonsku stjórnini er at fáa samtyktina ígjøgnum trygdarráðið, tá tað í næstu viku fer at umrøða Miðeytsur. Uttanríkisráðharrarnir í Russlandi og Bretlandi, Sergej Lavrov og David Miliband, koma til New York at taka lut í einum Somalia-orðaskifti, sum verður týsdagin, og ætlanin hjá amerikonsku stjórnini er at fáa alt avgreitt ísenn.

Amerikanski varasendiharrin í ST, Alejandro Wolff, sigur við AP, at tað er semja í trygdarráðnum um at steðga teimum somalisku sjórænarunum á sjónum. Men tað amerikanska uppskotið umfatar eisini álop á støðir hjá sjórænarunum uppi á landi, um so er, at somaliska stjórnin góðkennir álopini.

NATO hevur herskip úti fyri somalisku strondini, og ES-londini samtyktu mánadagin at senda herskip og flogfør til leiðina at fáa enda á teimum nógvu sjóránunum.

## Nobel-vinnari skal stýra orku-politikkinum

Steven Chu verður amerikanskur orkumálaráðharri

Keldur í demokratiska flokkinum í USA siga, at Barrack Obama hevur valt Steven Chu til orkumálaráðharra. Chu fekk Nobel-heiðurslønina í alisfrøði í 1997 og verður mettur millum teir fremstu serfrøðingarnar innan alternativa orku.

Afturat sær fær Chu nakrar embætismenn, sum millum annað arbeiddu í umsitingini hjá Bill Clinton.

Barrack Obama hevur lovað at leggja stóran dent á alternativar orkukeldur, og hann hevur boðað frá, at USA fer at brúka fleiri milliardir dollarar at finna nýggjar orkukeldur og at skapa fleiri arbeiðspláss innan grøna orku.

# Kvinna lá deyð á ellisheimi í seks vikur

**Svenska kvinnan hevði sagt heimshjálpina frá sær og vildi ikki hava hjálp frá starvsfólkinum, sum goingu fram við hurð hennara hvønn dag**



*Kvinnan vildi ikki hava hjálp frá starvsfólkinum*
*Mynd: Aftenposten*

Ein eldri kvinna er funnin deyð í sínari íbúð, sum er partur av ellisheiminum í býnum Karlskrona, og kanningar benda á, at kvinnan doyði fyri seks vikum síðani, skrivar Aftonbladet.

Kvinnan hevði búð í íbúðini síðani á sumri í 2000. Hon hevði ikki heimahjálp, tí hana hevði hon sagt frá sær, og hon vildi heldur ikki hava hjálp frá starvsfólkinum á ellisheiminum, hóast tey gingu fram við hurð hennara hvønn dag.

Av tí sama hugdi eingin inn til kvinnuna, fyrr enn onkur varnaðist, at hennara postkassi var á tremur, og at ein partur av postinum hevði ligið í postkassanum í seks vikur. Tá fólk so fóru inn í íbúðina, lá kvinnan deyð á sofuni.

Teir kommunalu myndugleikarnir í Karlkrona halda seg ikki hava gjørt nakað skeivt, tí kvinnan vildi ikki hava sjálp.

## STUTT SAGT

### Lufthansa keypir

Týska flogfelagið Lufthansa hevur keypt allan partapeningin í lágprísflogfelagnum Germanwings. Lufthansa átti 49 prosent av partapeninginum frammanundan. Germanwings bleiv stovnað í 2002. Felagið rekur 25 flogfør av slagnum Airbus A319 og flutti í fjør meiri enn átta milliónir ferðafólk millum 69 ymsar floghavnir.

Lufthansa hevur eisini keypt 41,5 prosent av partapeninginum í tí almenna eysturríkska flogfelagnum Austrian Airlines. Týska felagið hevur kunngjørt, at tað ætlar at keypa hin partin av eysturríkska felagnum næsta ár.




*Nú eigur Lufthansa alt Germanwings*
*Mynd: DPA*

### Fingu Nobel-heiðurin

Fyrrverandi finski forsetin Martti Ahtisaari var í gjár í Oslo og tók ímóti ársins Nobel-friðarheiðursløn. Um somu tíð handaði svenski kongurin fleiri heiðurslønir í Stopckholm.

Av teimum heiðrarðu vóru ikki minni enn tríggir fransmenn. Jean-Marie Le Clezio fekk ársins bókmentaheiðursløn, og Luc Montagnier og Francoise Barre-Sinoussi fingu ársins heiðursløn í læknavísindi saman við týskaranum Harald zur Hausen.

Amerikanski hagfrøðingurin Paul Krugman fekk Nobel-heiðurslønina í hagfrøði, og japonsku Makoto Kobayashi og Toshihide Maskawa vórðu heiðraðir fyri teirra avrik innan alisfrøði.

Nobel-heiðurslønina í evnafrøði fingu amerikanararnir Martin Chalfie og Roger Tsien og japanin Osamu Shimomura.

Tey, sum verða heiðrað við Nobel-heiðurslønini, fáa eina gullmynt, eitt heiðursskjal og 10 milliónir svenskar krónur.